## HEILSANIR



**Góði beiggi**
Hjartaliga tillukku á 6 ára degnum 13. mai. Vit elska teg.
**Kala, mamma og babba**



**Góða gumma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 12. mai. Eisini ein heilsan til ommusysti og ommubeiggja, ið fylla sama dag.
**Heilsan, Tóki**



**Góða, fitta mostir**
Tillukku á 14 ára føðingardegnum í dag.
**Heilsan, Guðrið**



**Nicolina Poulsen, Tórshavn**
Góða Nicolina! Hjartaliga tillukku á 15 ára degnum.
**Kærar heilsanir, abbin og omman**



**Vónbjørt í Jansagerði**
Góða Vónbjørt, vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 21 ára degnum 8. mai.
**Heilsan, mamma og Rúni**



**Góða Sunniva**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 10. mai. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan, mamma, babba, Elsebeth, Gerda og beiggi**



**Góða Teresa**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 8. mai. Mamma og babba elska teg. Gud signið framtíð tína.





**Góða Fanný**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum mánadagin. Alt tað besta ynskja vit tykkum øllum.
**Heilsan, omma og abbi**



**Vónbjørt í Jansagerði**
Góða stórasysti, tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan, Rúni, Sólbjørn og Katrina**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ..........................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



**máling & gólv**
**WISCANDERS**
SLITSTERKT STAVPARKETT OG PLANK
***CORKLOC**
(skal ikki límast)
Eitt lakera tundurgólv í verður álagt Corkloc mátanum
Eisini hava vit tundurflísar við vinyl slitlag
**máling & gólv**
við Landavegin
Tlf. 316066

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum stuðlaðu Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum til løgtingsvalið 30. apríl

Ein serlig tøkk til tykkum 178, ið stuðlaðu mær persónliga

**Mamy Dahl Sørensen**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3353
Navn: Sp/f Plastrok
Adressa: Á Heygnum Mikla 15, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.05.2002
Viðtøkudato: 01.05.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Petur í Gong, Á Heygnum Mikla 15, 100 Tórshavn.
Stjórn: Petur í Gong, Á Heygnum Mikla 15, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión, v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.05.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka: Plastsveising og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. mai 2002

Kristin Balle

TOR SHIPPING

## Søkt verður eftir fólki til tangaskipið »Bergina«

Søkt verður eftir dugnaligum og royndum motormonnum dekkarum (fulltiknum matrósum) til tangaskipið »Bergina«.

**Min. krøv til umsøkjarar:**
- Drúgvar royndir
- Góðkenda læknakanning (bláa bókin)
- STCW-góðkent trygdar-/ og brandskeið
- Kunna skandinaviskt og enskt mál
- Dekkararnir skulu verða egnaðir til kagtænastu

Áhugaðir biðjast vinarliga senda skrivliga umsókn til:

**SP/F Bergshav**
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252
FO-110 Tórshavn · Tlf. 318531 · Fax 319369

## Framleiðslustjóri í SvF

Í Sjónvarpi Føroya er eitt starv leyst at søkja sum leiðari fyri framleiðsludeildini. Deildin er nýskipað og hevur ábyrgdina av verkligu tilrættaleggingini av sendingum sjónvarpsins.

**Innihaldið í starvinum.**
Framleiðslustjórin svarar mótvegis stjóranum fyri dagligu skipanini og langtíðartilrættaleggingini av allari framleiðslu sjónvarpsins.

Framleiðslustjórin hevur undir sær alt tøknistarvsfólkið á stovninum og varðar av arbeiðsviðurskiftum og fakligu menning teirra.

Framleiðsludeildin býtir tøknistarvsfólk, útgerð og høli millum einstøku framleiðslurnar, samskipar framleiðslurnar og leggur í samstarvi við avvarðandi programmfólk og programmdeildarleiðarar neyvar framleiðsluætlanir fyri einstøku verkevnini, ið framleiðast skulu til skrá sjónvarpsins.

Framleiðsludeildin umsitur soleiðis allar tænastur, alla útgerð og høli, ið krevjast fyri framleiðslu av tí innihaldi, ið programmdeildirnar framleiða til skrá sjónvarpsins, hetta umfatar eisini bandasavnið, týðaradeildina, og KT/tøknideildina. Framleiðslustjórin er ráðgevi hjá hinum deildunum viðvíkjandi skipan og tilrættalegging av størri verkætlanum.

**Førleikakrøv.**
Hægri útbúgving ella yrkisútbúgving innan films- og/ella sjónvarpsframleiðslu ella aðra viðkomandi útbúgving. Hollar royndir innan films- og sjónvarpsframleiðslu ella aðra samanberiliga framleiðslu innan fjølmiðlar og/ella mentan. Leiðsluroyndir og góð leiðara- og fyriskipanarevni.

**Løn og setanartreytir.**
Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður at seta frá 1. juli ella skjótast til ber.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin, tann 21. maj.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóra, tel 340400.

svf
Sjónvarp Føroya

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.*

**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
Sosialurin - 311820
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið



Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

## Sumbiar Kommuna

Heitir á øll tey sum hava bátar, bilar o.a. inni í »Sagverksbygninginum« í Lopra, um at beina tað burtur beinan vegin, og í seinasta lagi 25. mai 2002, ella verður tað beint burtur fyri eigarans rokning.

Eru spurningar, kunnu tit seta tykkum í samband við arbeiðsformannin, tlf. 223904.

**Sumbiar Kommuna**